# Kommunala sjálvstýri skal økjast




*Hilmar Høgenni av Løgmansskrivstovuni hevur staðið á odda fyri arbeiðsbólkinum, ið hósdagin lat løgmanni eitt tilmæli um uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Fleiri økir skulu leggjast út til kommunur at umsita og fíggja, er niðurstøðan í tilmælinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Løgmaður vil fegin økja tað kommunala sjálvstýri, og tað verður gjørt við at leggja fleiri uppgávur út til kommunurnar at fyrisita og fíggja. Umráðandi er at fíggjarlig ábyrgd og avgerðarrættur fylgjast. Ein arbeiðsbólkur hevur gjørt tilmæli um, hvussu hetta kann fremjast**

UPPGÁVUBÝTI
*Stefan í Skorini*

Tað er neyðugt at hava eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur í Føroyum. Harumframt er tað umráðandi, at fíggjarlig ábyrgd og avgerðarrættur ganga hond í hond. Tann, ið rindar, tekur tær avgerðirnar.

Ætlan løgmans er at leggja fleiri uppgávur út til kommunur at greiða úr hondum. Sum støðan er nú, hevur landið fleiri uppgávur, ið kommunurnar framyvir skulu hava ábyrgdina av, og tær skulu eisini fíggja hetta virksemið.

Hetta verður kallað kommunalt sjálvstýri.

Hósdagin fekk løgmaður handað eitt tilmæli um uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, sum ein arbeiðsbólkur við trettan fólkum hevur gjørt. Endamálið við tilmælinum er at fáa eitt greiðari býti og mælt verður til at leggja enn fleiri uppgávur til kommunur at umsita og fíggja. Arbeiðsbólkurin leggur stóran dent á, at fíggjarliga ábyrgdin skal fylgja avgerðarrættinum.

## Leggja fleiri øki út

Tá økir verða latin kommunum at umsita, skulu tær eisini syrgja fyri fíggingini. Hetta verður gjørt við at lækka landsskattin og hækka kommunuskattin. Á tann hátt fær landskassin minni skattainntøkur og samstundis færri uppgávur at loysa.

Løgmaður vísir á, at ein stórur partur av útreiðslum landskassans skulu leggjast út til kommunurnar.



*Sum landsstýrismaður við kommunumálum hevur løgmaður biðið um hetta álitið. Hann metir, at tað er breið semja í tinginum, um at leggja fleiri byrðar á kommunurnar at umsita*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Løgtingið er longu farið undir hesa langtíðar ætlan við at leggja barnaansingina út til kommunurnar at umsita og fíggja. Hetta sæst aftur á peningaligu flytingunum millum land og kommunu.

Í 1999 lat landið kommununum 120 milliónir krónur. Í næsta ár verður flytingin millum hesi bæði bara 62 milliónir krónur. Orsøkin til hesa minking er fyrst og fremst barnaansingin, ið ikki longur er ein uppgáva hjá landinum.

## Útjavning

Ójavnt er, hvussu tær ymsu kommunurnar eru fyri. Tær hava ymiskt inntøkugrundarlag og ymiskan útreiðslutørv.

Fyri at koma hesum trupulleika til lívs, hevur arbeiðsbólkurin mælt til at seta eina útjavningarskipan í verk.

Henda skipan skal virka soleiðis, at tær kommunur, ið hava størst inntøkugrundarlag, lata hinum kommununum ein part av sínum inntøkum. Soleiðis verður munurin millum kommunurnar útjavnaður.

Eitt dømi er ein kommuna, ið hevur eina skattskylduga inntøku pr. íbúgva á 100.000 krónur. Skattskylduga inntøkan í aðrari kommunu eru 150.000 krónur pr. íbúgva. Í eini útjavningarskipan fær tann fyrra kommunan ein part av inntøkuni hjá tí seinnu kommununi.

Hetta verður gjørt fyri at javna munin millum tær ymsu kommunurnar. Nakrar hava nógv eldri fólk og fá at gjalda fyri tey, meðan aðrar hava nógvar borgarar við høgari inntøku.

## Fyri tingið

Løgmaður grundar í løtuni á, um hetta álitið skal leggjast fyri tingið til aðalorðaskifti. Um so er, verður tað í hesi tingsetuni.

Løgmaður heldur, at tað er breið semja í tinginum um, at hetta er leiðin framá, tá talan er um uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur.

Uppgávurnar skulu røkjast so nær borgaranum sum gjørligt, men tó skulu tær vera samfelagsbúskaparliga forsvarligar.

Tað, sum víðari hendir við hesum álitinum er, at øll aðalstýrini undir løgmanni seta nýggjar arbeiðsbólkar at gera ítøkilig uppskot til, hvussu henda ætlan kann fremjast í verki.

Meira ítøkiliga nevnir arbeiðsbólkurin m.a. í tilmælinum, at tann parturin av eldraøkinum, ið er egnaður at leggja út, sum skjótast verður lagdur út til kommunurnar.

Tað kann nevnast, at arbeiðsbólkurin mælir til at avtaka og broyta fleiri enn hundrað lógir, ið ikki eru tíðarhóskandi ella ov stirvnar.

## 2278 akfør kannað í grein 13 kanningum

GREIN 13
*Stefan í Skorini*

Løgreglan gjørdi í tvær vikur – frá 5. til 18. november – grein 13 kanningar um alt landið. Tilsamans vórðu 2278 akfør kannað. Ikki øll akførini vóru í lagi. 258 frágreiðingar vórðu skrivaðar.

Mest vanliga orsøkin hjá løgregluni at geva bót var, at ljósini ikki vóru í lagi. 134 førarar vórðu revsaðir fyri ikki at hava ljósini í lagi. 99 førarar høvdu ikki koyrikortið hjá sær, 79 nýttu ikki trygdarbelti. Á seks bilum vóru dekkini ólóglig, og bara ein varð tikin fyri at koyra við kenning undir grein 13 kanningunum.

Førararnir fingu bøtur, ið samanlagt komu uppá 92.000 krónur.



# Kemur ikki óvart



*Gerard Lognberg, borgarstjóri í Skopun, heldur, at tað er nógv meiri álvarsamt at leggja Teistan á Gomlu Rætt um náttina, enn at fólk í Sandoynni mugu brúka hálvan tíma eyka um morgunin at ferðast í.*

**- Vit hava vitað alla tíðina, at Teistin skal leggja at úti í Hesti á morgni. Tað stendur í lógini fyri Teistan, og ferjulegan verður útbygt til tað sama fyri nógvar pengar, sigur Gerard Lognberg, borgarstjóri í Skopun**

TEISTIN
*Turið Kjølbro*

- Vit hava vitað alla tíðina, at Teistin skal leggja at úti í Hesti á morgni, so tað kemur ikki óvart á okkum, sigur Gerard Lognberg, borgarstjóri í Skopun.

Í tíðindasendingini í Útvarpi Føroya mikukvøldið meldaði Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður og borgarstjóri á Sandi, hart út viðvíkjandi ferðaætlanini hjá Teistanum, ið siglur ímillum Gomlu Rætt og Skopun. Hann segði seg fara at umhugsa sín stuðul til samgonguna um Teistin sum ætlað skal leggja at í Hesti á fyrsta túrinum um morgunin um fjørðin. Leggur Teistin at í Hesti á veg á Gomlu Rætt, verður teinurin hjá sandoyggjafólki lítlan hálvan tíma longri. Og tað finna fólk í oynni seg ikki í, segði hann.

Borgarstjórin í Skopun er ikki so samdur við borgarstjóranum á Sandi. Hann heldur, at tað er nógv meiri álvarsamt, um ætlanin at leggja Teistan á Gomlu Rætt um náttina verður veruleiki.

- Um Teistin skal liggja á Gomlu Rætt um náttina, verður sjúkraflutningstænastan hjá okkum sera ótrygg. Hann liggur í Skopun sum nú er um náttina, men talan er um at broyta hetta. Í ringum veðri sleppur Teistin ikki inn í Skopun, tí hetta er brimpláss, men út úr havnini sleppur hann í øllum veðri. Tí eigur hann at liggja her um náttina fyri at tryggja skjótan veg til Landssjúkrahúsið, sigur Gerard Lognberg.

At Teistin skal sigla út í Hest, er sjálvsagt, heldur Gerard Lognberg.

- Tað stendur í lógini fyri Teistan, at hann skal sigla út í Hest, og ferjulegan verður útbygt til tað sama fyri nógvar pengar. Hinvegin skilji eg væl, at fólk vilja sleppa skjótt til arbeiðis um morgunin, men tað vilja fólk í Hesti eisini, sigur Gerard Lognberg, sum annars er ógvuliga væl nøgdur við Teistan.

## Pendlaramentan

Spurningurin fólk seta sær, er, um tað er rímuligt, at seta eina ferju afturat í sigling, fyri at spara sandingum 25 minuttir á morgni. Gamla Rætt var á sinni ein ógvuliga dýr íløga, somuleiðis havnin í Skopun hevur kostað ógvuliga nógv ígjøgnum eitt langt tíðarskeið. Nú er nýggj ferja komin, sum eisini hevur kostað rættiliga fitt, ferjulegan í Hesti verður útbygt til endamálið, og vegasambandið av Gomlu Rætt til Havnar er og verður nútímansgjørt við breiðum, góðum vegi, sum styttir um farleiðina. Tilsamans nógvar hundraðtals miljónir til ferðasambandið í Sandoynna. Henda spurningin hava vit sett Páll á Reynatúgvu.

- Vit hava í drúgva tíð arbeitt við at fáa sandingum gott ferðasamband og nú tá tað loksins er eydnast okkum at fáa eitt samband, har tað ber til at búgva í oynni og arbeiða aðrastaðni, er tað ógvuliga óheppið, at tíðin at ferðast verður so long. Fólk eru flutt í oynna, tí ferðasambandið fór at gerast betri. Ungfólk í oynni eiga eisini at hava møguleika fyri at búgva heima meðan tey ganga í skúla í Havn. Ein hálvur tími um morgunin hevur nógv at siga tá.

Páll á Reynatúgvu vísir á, at tá ið ferjulegan í Hesti var til viðgerðar á tingi, legði hann uppskot fram um at byggja eina minni ferju fyri 4-5 mió. krónur, sum klárar fólk og farm úr og í Hestoynna.

- Vit vita, at sera fá fólk ferðast fyrsta túrin úr Hesti um morgunin. Sjálvsagt skulu Hestfólk eisini sleppa skjótt og væl til Havnar, og tí hava vit eisini miðvíst arbeitt við eini aðrari loysn, sigur Páll á Reynatúgvu, sum ikki hevur gjørt nakra kostnaðarmeting av, hvat tað kostar at seta eina ferju afturat í sigling um fjørðin.

# Hent sangbók

**Rinkusteinar er heitið á nýggjari barnasangbók eftir Alexandur Kristiansen, ið øll sum syngja við børnum ella fáast við tónleik, fáa gleði av**

ÚTGÁVA

Føroya Skúlabókagrunnur gevur út nýggja sangbók eftir Alexandur Kristiansen. Í bókini eru 99 barnasangir.

Alexandur hevur áður givið tvær barnasangbøkur út, ið nú eru uppseldar, Kannubjølluvísur, sum kom út í 1977 og Barnabros, sum kom út í 1983. Flestu sangirnir í teimum bókunum eru tiknir við í nýggju sangbókina. Tað serliga við hesari bókini er, at nógvir nýggir sangir eru við, ið tónaskaldið Knút Olsen hevur gjørt lag til. Knút hevur eisini skrivað nótar við besiffringum til allar sangirnar.

Hetta er ein sera hent sangbók til skúlabrúks. Fleiri av sangunum hava verið at hoyrt og eru væl dámdir av børnum. Øll kenna vit Grísaflísa Pætur og Dorius í Depli. Upprunaligir og føroyskir sangir verða sum frálíður ein partur av tí mentanararvi, vit geva víðari til komandi ættarlið. Tí er hetta ein bók, ið ikki einans kann verða brúkt í skúlunum. Øll, ið syngja við børnum ella fáast við tónleik, kunnu fáa nógva gleði av henni.

Bókin er prýdd við tekningum eftir Olivur við Neyst. Kápuna hava Olivur við Neyst og Ingi Joensen gjørt. Hestprent hevur prentað.

Sangbókin Rinkusteinar er 121 blaðsíður við nótum og kostar 120,00 krónur.

# Firvaldsbók endurprentað

**Firvaldsbók 3 er komin í øktari og broyttari útgávu**

ÚTGÁVA

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út Firvaldsbók 3 í øktari og broyttari útgávu. Fyrsta útgávan kom út í 1998. Gunnvá Dam, lærari, hevur skrivað, og Olivur við Neyst hevur teknað.

Fleiri nýggjar uppgávur eru komnar við í hesa útgávuna. Firvaldsbøkurnar eru eykatilfar til byrjanarundirvísingina. Uppgávurnar eru stuttligar, og næmingarnir kunnu arbeiða sjálvstøðugt á tí stigi, teir eru á. Harafturat kunnu næmingarnir sjálvir síggja, um uppgávurnar eru rætt loystar ella ikki. Nógvar uppgávur hóska væl í serundirvísingini, t.d. sum stuðul at læra seg at lesa.

Umbróting, repro og prent hevur Hestprent staðið fyri.

Firvaldsbók 3 er 48 blaðsíður við svart/hvítum tekningum og kostar 40,00 krónur.

# Verðin er ikki so skilagóð

**Húðsemi eitur nýtt yrkingasavn eftir Tórodd Poulsen**

ÚTGÁVA

Mentunargrunnur Studentafelagsins hevur givið út nýtt yrkingasavn eftir Tórodd Poulsen. Tað eftur Húðsemi. Speiskar eygleiðingar samansjóðaðar við djúphugsni mynda eitt sterkt yrkingasavn. Leita verður eftir bara einum evarkalítlum at trúgva upp á í einum heimi við ov nógvum høpi. Sum vant vendir og snarar høvundurin bæði spurningum og málinum, so grundarlagið fer at rilla undir lesaranum. Svør eru at kalla eingi, men tað er heldur ikki tað, sum tað snýr seg um, men ístaðin at seta teir røttu spurningarnar. Verðin er ikki so skilagóð, sum hon letst, og tað vísir Tóroddur uppá næstan 90 ymiskar mátar.

Permuna á savninum hevur Ova gjørt. Savnið er 95 blaðsíður og kostar 140 krónur.